# Maria livir eitt lív í rennuni

Tað er av fagrasta veðri henda mikudagin í oktober. Heystarsólin hevur verið frammi allan dagin og framvið sjóvarstrondini hómast ikki eitt brot. Tað lotar ikki úr hanakjafti.

Dagin fyri regnaði av grimd og tað var nógvur vindur, men í dag hevur verið turt frá morgunstundini. Hetta sæst eisini á teimum, sum fegin fara til arbeiðis, í skúla ella til annað virksemi. Skjótt er at gloyma ein ringan veðurdag, nú sólin aftur er dagað undan.

Í einum húsum í eini av størru bygdunum í Føroyum stríðist ein mamma við at fáa tey smærru børnini í skúla og onkran av teimum eldru til arbeiðis. Ein tíma seinni skal hon sjálv møta á sínum arbeiðsplássi.

Henda dagin er hvørki sól ella kvirra í hennara lívi: Hon hevur roynt at hildið maskuni so væl sum hon nú einaferð kundi við morgunmatarborðið. Men nú friður valdar í heiminum, kemur ófriðurin upp í barm hennara. Hon setur seg tungliga niður við køksborðið við eini sigarett og einum kaffimunni fyri at hugsa um telefonsamrøðuna í gjárkvøldið við ta elstu dóttrina sum býr í Danmark.

Tað átti at verið ein góð kensla, tá børnini ringja heim til mammu sína úr útlondum. Men í hesum førinum er støðan munandi øðrvísi:

Í gjárkvøldið fekk mamman enn eitt prógv um, hvussu illa tað stendur til hjá dóttrini í Danmark.

## Einki lív fyri nakran

Mamman suffar fram fyri seg, og letur so tankarnar fara ta longu leiðina til hennara fyrstafødda gentubarn, Maria. Einaferð var hon sólstrálan hjá ernu foreldrum sínum. Í dag er lítil sól at hóma.

Tað stormar rundan um Mariu. Alt er grátt í grátt. Gerandisdagur hennara er ein stór fløkja. Hon veit neyvan á kvøldi at siga, hvar hon á morgni vaknar. Hjá henni er eingin turkur at hóma.

Mamman fer í skápið í køkinum. Tekur fram eina mynd, sum varð tikin av dóttrini í 2004. Hon hyggur eftir henni eina góða løtu, turkar eitt tár úr eyganum: Myndin vísti longu tá, hvussu nógv hon




*Maria (dulnevni) livir á gøtuni í stórum donskum býi. Her eigur hon ongan góðan, men í Føroyum sita mamma, systkin og børn og bíða eftir henni. Tey vita, at Mariu eisini leingist eftir síni familju. Kanska fer hon heim á jólum ....?*
*(Modellmynd: POLFOTO)*

var merkt av misnýtsluni. Og fýra ár eru long tíð hjá einari sum er úti í stórari misnýtslu av alskyns rúsevnum.

Tað er ikki long tíð gingin – bert góður mánaði – síðani Maria var í viðgerð fyri misbrúk sítt her heima. Tá kom hon rættiliga fyri seg, og byrjaði enntá so smátt at hugsa um annað enn tann næsta rúsin.

Men longsulin eftir rúsdrekka, rúsevnum og tablettum gjørdist ov stórur. Tað var lívið um at gera at sleppa niður aftur til alt tað, sum lívið á gøtuni í Danmark hevði at bjóða.

Mamman leggur myndina frá sær aftur, og hugsar serliga um tann eina setningin, sum Maria hevði sagt við seg í telefonini í gjárkvøldið:

»Mamma, nú drekki eg bara 8 til 10 øl um dagin ... + tablettir og alt hitt!«. Í mun til eina fløsku av Vodka um dagin + tablettir og alt hitt, er hetta kanska ikki av tí mesta. Men var hetta nakað at fegnast um? Óttin hjá mammuni er framvegis har sum ein nívandi kensla:

- Hvussu leingi aftrat kann tað ganga soleiðis?, hugsar mamman við sjálvum sær. – Hvussu leingi kann Maria liva soleiðis? Nær heldur tað uppat? Nær Maria? Nær ... ?

Eingin kann geva henni svar uppá hesar stóru spurningar hennara. Svarini finnur hon onkustaðni á gøtuni í einum av størstu býunum í Danmark. Mamman kann bara staðfesta, at dóttir hennara er komin so langt út, at hon kann vænta sær deyðsboð av henni hvønn einasta dag.

- Hetta er einki lív – hvørki fyri hana, fyri meg ella okkara familju!

Hon situr eina løtu aftrat. Drekkur kaffikoppin lidnan, og fer so at gera seg kláran at fara til arbeiðis. Vónloysið lýsir úr eygum hennara. Hon veit, at hesin dagurin eisini verður strævin.

- Arbeiðið heldur lívið í mær. Skuldi eg ikki til arbeiðis nú um eina løtu, so hevði eg lagt meg aftur í songina. Og har hevði eg ligið í allan samlan dag!